## Reiðarar egnan diplomat

Fyri fyrstu ferð fær ein diplomatur á einari norskari sendistovu løn frá øðrum enn tí almenna. Tað er norska reiðarafelagið, sum hevur fingið loyvi at rinda fyri ein diplomat á norsku sendistovuni í Washington. Aftenposten skrivar, at reiðarafelagið og handils- og vinnumálaráðið í Oslo rinda útreiðslurnar av starvinum, og at parturin hjá reiðarafelagnum er 500.000 norskar krónur. Norska reiðarafelagið hevur leingi strongt á stjórnina fyri at fáa hana at seta ein serligan sjóvinnu-diplomat í Washington, og tá felagið beyð sær til at rinda ein part av kostnaðinum, játtaði stjórnin.



## Ætlaðu at flyta børn úr Haiti

Myndugleikarnir í Haiti hava tikið 10 amerikanarar, sum royndu at taka 33 børn við sær úr landinum. Haitiski almannamálaráðharrin sigur, at annaðhvørt er talan um mannasmugling ella ólógliga ættleiðing. Hon vísir á, at eingin hevur loyvi vat fara úr Haiti við børnum uttan loyvi frá myndugleikunum, og at amerikanararnir høvdu einki tílíkt loyvi. Amerikanararnir siga hinvegin, at tey høvdu fingið loyvi frá myndugleikunum í grannalandinum Dominikanska Lýðveldinum at flyta børnini á eitt barnaheim har. Amerikanararnir vórðu tiknir á markinum við børnunum.



*Í Føroya Banka er ongin seðil á maskinuni, sum sigur frá, at tú skalt rinda 50 krónur fyri at fáa hana at veksla tína myntir, men tað skalt tú, tá tú kemur til kassan við kvittanini um peniningin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*




*Um tú skalt nýta hesa maskinuna í Eik, skalt tú rinda 50 krónur til bankan fyri ómakin. Harafturat sleppur tú ikki at gera meira enn 1000 krónur í myntum til seðlar*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

### Munur á børnum og vaksnum

Andrass H. Arge, brúkaraumboðsmaður, staðfestir, at tað ikki er nakað serliga løgið, at bankarnir gera mun á børnum og vaksnum, sum fara inn í bankan við myntum og vilja hava peningin út í seðlum.

– Reint juridiskt verður ofta munur gjørdur á børnum og vaksnum, so eg dugi ikki at siggja nakað forgjørt í hasum, sigur Andrass H. Arge.

Viðvíkjandi spurninginum um kostnaðin, sigur brúkaraumboðið, at tað ikki er so nógv hann kann siga um tað.

**-eij**

# 50 krónur fyri at tøma bússuna

**Tað kostar 50 krónur, um tú tømir bússuna í antin Eik ella Føroya Banka og ikki ætlar at seta peningin inn á kontu í bankanum. – Tú rindar eisini fyri at fáa ketsjupp til pylsurnar, sigur Niels Joensen, privatkundaleiðari í Føroya Banka**

PENGAR

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Bankarnir hava gjørt av, at tað ikki skal vera ókeypis at fáa eina maskinu í bankanum at telja og veksla pening hjá fólki.

Bæði Eik og Føroya Banki hava nevniliga gjørt av, at tað kostar at nýta sjálvvirkandi teljimaskinuna, um tú ikki setir peningin inn á kontu í bankanum.

Hetta vil við øðrum orðum eisini siga, at um ein fer í bankan við eini lítlari mongd av myntum, so loysir tað seg illa at fáa bankan at telja peningin fyri seg

Orsøkin er einføld.

Bankin tekur eitt ómaksgjald á 50 krónur fyri at telja og veksla peningin, um tú ikki setir peningin inn á kontu – hóast maskinan er sjálvvirkandi.

So hevur tú 200 krónur í myntum og ætlar at fáa tað til seðlar úr bankanum, so hevur tú 150 krónur eftir, tá tú fert út úr bankanum.

### Rinda fyri tænastu

Orsøkin til, at bankarnir hava gjørt av taka ómaksgjald fyri at fólk sjálvi nýta eina maskinu í bankanum er sambært Niels Joensen, privatkundaleiðara í Føroya Banka, at bankin hevur gjørt eina íløgu.

– Vit hava gjørt eina íløgu í eina tænastu til kundan, sum hann so rindar fyri, og tað er ikki óvanligt at rinda fyri tænastur.

– Tú rindar eisini fyri at fáa ketsjup til pylsurnar út pylsuvogninum, staðfestir Niels Joensen

### Børnini sleppa undan

Men er tað eitt barn, sum skal tøma sparigrísin, so gongur tað ikki fyri seg á heilt sama hátt.

– Børnini eru ikki umfatað av hasum. Tað var ikki vanligt at standa og hála pengar úr lummanum hjá børnum – um mann kann siga soleiðis, sigur Niels Joensen.

Hann leggur afturat, at hetta gjald meira er rættað til onnur sum hava nógvar myntir, sum skulu vekslast.

– Tað kann til dømis vera, at onkur hevur havt tombola ella okkurt líknandi. Tá hava tey ofta nógvar smápengar, sum skulu umsetast, og so rinda tey fyri eina tænastu, sum er til gagns fyri tey, sigur Niels Joensen.